# Námsfrøðingar og avloysarar til Stropan á Kambsdali

***Brennur tú fyri trivnaðinum og menningini hjá tí einstaka barninum?***
***Kundi tú hugsa tær at arbeitt miðvíst við Betri vinir og motoriskari sansastimbran?***

Vit sóknast eftir námsfrøðingum, ið vilja verða við í okkara menningararbeiði og sum ynskja at starvast í einum umhvørvi, har tú kanst verða við til at mynda og seta tín dám á okkara frálíka stovn við óteljandi møguleikum.

Stropin byrjaði sítt virksemi í september 2012 og er ætlaður 72 børnum í aldrinum 0-6 ár. Á stovninum eru fimm stovur: tvær vøggustovur, tvær barnagarðsstovur og ein miðlingastova. Á stovninum starvast 18 dugnalig, eldhugað, nærløgd, fjølbroytt og stuttlig starvsfólk, ið gleða seg at fáa teg í starvsfólkahópin.

Dagstovnurin liggur á Kambsdali, ið er ein sonn náttúruperla, ið setur stóran dám á okkara gerandisdag. Vit hava framúr góðar umstøður bæði innan- og uttandura, har áhugamálini og trivnaðurin hjá børnunum, eru okkara fremstu endamál.

Á stovninum arbeiða vit m.a. við Betri vinir, ið er ein fyribyrgjandi verkætlan ímóti happing. Harafturat leggja vit stóran dent á motoriska sansastimbran og hava vit starvsfólk við viðkomandi útbúgvingum og royndum innan øki.

**Vit sóknast eftir:**
Námsfrøðingum, ið kunnu arbeiða sjálvstøðugir, eru ja-ligir, eru ígongdsetandi, duga at samstarva, taka ábyrgd, og duga at seta sær mál, eins og at skapa ein spennandi og fjølbroyttan gerandisdag, har barnið er í miðdeplinum.

**Harafturat sóknast vit eftir:**

Avloysarum, ið kunnu starvast skiftandi vaktir og møta við stutttíðar fyrivarni. Lesandi eru eisini vælkomin at søkja.

**Vit bjóða:**

- Áhugaverd fulltíðarstørv ætlað námsfrøðingum, har møguleiki kann verða fyri niðursettari arbeiðstíð.
- Størv við skemalagdari fyrireikingartíð, ið gevur góðar umstøður til at fyrireika, eftirmeta og útinna ta námsfrøðiliga arbeiði.
- Størv, har menningin hjá tí enstaka barninum er í miðdeplinum.
- Størv, har foreldrasamstarv verður raðfest høgt.
- Størv, har ein kemur at hava ávirkan á sítt arbeiðslív.
- Størv, har ein gerst partur av einum góðum og støðugum starvsfólkahópi, ið raðfestur trivnað og fakliga menning høgt.

**Setanarviðurskifti:**

**Størvini verða sett mánadagin 7. august 2023** ella eftir nærri avtalu. Um ongir námsfrøðingar søkja, kunnu hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv. Námsfrøðingar, ið fáa prógv í summar eru eisini vælkomnir at søkja. Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag millum kl. 07.15 – 17.00. Harafturat eru fundir eftir arbeiðstíð.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarflokkur 2 - 8 fyri hjálparfólk og 11 – 24 fyri námsfrøðingar. Sambært §2 í barnaváttanarlógini hevur Fuglafjarðar kommuna skyldu til at fáa barnaváttan til vega, áðrenn umsøkjari verður settur í starv.

**Umsókn:**

Skrivlig umsókn saman við prógvi, møguligum viðmæli/-um skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi: **<u>Mánadagin 5. juni 2023</u>**

**Fuglafjarðar kommuna**

Í støð 5

530 Fuglafjørður

Ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo

Meira fæst at vita um størvini og um stovnin við at venda sær til Annu Joensen, leiðara á tlf. 238041 ella stropin@fuglafjordur.fo .Eisini ert tú vælkomin at vitja okkum á Børkugøtu 1 á Kambsdali.